# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 2. septembur 2022, kl. 20.00

Vísandi til §13. stk 2 í kommunustýrislógini kann kommunustýrið hava eykafund um 1/3 av limunum krevja tað. Tann 31. august 2022 kravdu Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen og Ingi Olsen eykafund til mál sum hava skund.

Tann 01. september 2022 svaraði Pauli T. Petersen, borgarstjóri áheitanini frá bygdarráðslimunum og kallaði inn til eyka bygdarráðsfund á kommunuskrivstovuni at verða tann 02. september 2022 kl 20:00.

Vísandi til grein 6, stk 2. um fundarskipan fyri Vestmanna Bygdarráð leiðir Bjørg á Rógvi, varaborgarstjóri fundin um borgarstjórin berst frá at møta á fundinum.

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Pauli T. Petersen, borgartsjóri boðað frá, at honum barst frá at møta á fundinum, tí hann er burturstaddur. 1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð tann 01. septembur og játtaði at møta.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av tiltaksliminum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**

**Mál 119**
Skriv frá Paula Trond Petersen um at verða loystir úr starvið sum borgarstjóri.
J.nr.: 22002-3-2022

Tann 29. august 2022 handaði Pauli Trond Petersen bygdarráðnum eitt skriv um at verða loystir úr starvinum sum borgarstjóri skjótast gjørligt.

**Viðv. 119**
Bygdarráðið einmælt samtykti at loysa Paula Trond Petersen úr starvinum sum borgarstjóri.

**Mál 120**
Skipan av bygdarráðnum.
J.nr.: 22042-1-2022

**Viðv. 120**

**Val av borgarstjóra:**
Bygdarráðið einmælt samtykti at velja Bjørg á Rógvi til borgarstjóra.

**Val av varaborgarstjóra:**
Bygdarráðið einmælt samtykti at velja Sáru Jógvansdóttir til varaborgarstjóra.

Borgarstjórin og varaborgarstjórin taka við starvinum tann 3. septembur 2022.

## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 2. septembur 2022, kl. 20.00

**Mál 121**
Val av nevndum og umboðum
22042-1-2020

**Viðv. 121**
**Tað varð einmælt samtykt at broyta nevndir og umboð við hesum broytingum:**

Í **Fíggjarnevndini** varð Pauli T. Petersen valdur sum varalimur

Í **Teknisku Nevnd** varð Ingi Olsen valdur fyri Bjørg á Rógvi. Pauli T. Petersen varð valdur sum varalimur. Tekniska Nevnd skipar seg á næst komandi fundi.

Í **Mentanarnevndina** varð Pauli T. Petersen valdur fyri Bjørg á Rógvi

Í **Trivnaðar- og Umhvørvisnevndina** varð Pauli T. Petersen valdur fyri Bjørg á Rógvi

Sum umboð í **Heimatænastuna í VEKS** vóru vald Bjørg á Rógvi og Sára Jógvansdóttir.

Sum varaumboð í **Føroya Kommunufelag** varð Sára Jógvansdóttir vald. Bjørg á Rógvi er umboð.

**Mál 122**
Setanarbrøkur borgarstjórans
J.nr. 8403002-1-2022

Vísandi til § 6, stk. 2 í kommunustýrislógini skal kommunustýrið áseta setanarbrøk borgarstjorans til antin 1/2 ella 1/1.

Umsitingin mælir Bygdarráðnum at seta setanarbrøk borgarstjórans til 1/1, og at setanarbrøkurin verður ásettur í stýrisskipanini fyri Vestmanna Bygdarráð.

**Viðv. 122**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Bókin Lisin. Fundurin lokin kl 20:40

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen